**Jørgen Niclasen**
**løgtingsmaður**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 23/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp** (Vinnufeløg undantikin kringvarpsgjald)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp**
(Vinnufeløg undantikin kringvarpsgjald)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 24. desember 2015, verður í § 7, stk. 3 “, kommunalir stovnar og feløg sambært § 5 í løgtingslóg um partafeløg og smápartafeløg (vinnufeløg)” broytt til: “og kommunalir stovnar”.

**§ 2**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Almennar viðmerkingar:**

Hetta uppskot varð lagt fram av Fólkaflokkinum 7. februar 2018 (lm.nr. 80/2017) og kom til atkvøðugreiðslu við 2. viðgerð 20. apríl 2018. Tá varð, eftir uppskoti frá samgongulimi, samtykt at beina málið aftur í nevnd. Har varð tað liggjandi og Løgtingið slapp tískil ikki at taka støðu til málið. Nú verður uppskotið lagt fram aftur, og vónar uppskotsstillarin, at Løgtingið hesa ferð sleppur at taka støðu til málið.

Sitandi samgonga hevur lagt eitt ótal av gjøldum á vinnuna. Millum gjøldini, sum samgongan hevur lagt á vinnuna, eru bensin- og dieselavgjaldið á akfør, avgjaldið á smyrjiolju, vektgjaldið á akfør hækkar, heilsutrygdargjaldið, tinglýsingaravgjaldið, umhvørvisavgjald og kringvarpsgjald. Eisini er álagt vinnuni hægri gjald til Barsilsskipanina og hægri gjald til Samhaldsfasta. Talan er um fleiri hundrað milliónir krónur hvørt ár. Harumframt eru fleiri hundrað milliónir í gjøldum lagdar á fiski- og alivinnuna. Hetta er ein vinnufíggindaligur politikkur, sum fer at kosta vælferð í framtíðini.

Í grannalondunum er gongdin hin øvuga. Skattur og avgjøld á vinnulívið verða lækkað ella strikað, fyri at gera umstøðurnar hjá vinnufyritøkum og íverksetarum betri og meira lokkandi.

Eitt dømi um hetta er, at Danmark í 2014 samtykti at strika kringvarpsgjaldið fyri fyritøkur (sonevnda erhvervslicensin) frá 1. januar 2015.

Men í Føroyum arbeiðir samgongan øvugan veg. Hevur m.a. álagt øllum vinnufeløgum kringvarpsgjald, eitt gjald, sum fyri serliga smærru fyritøkurnar er tyngjandi.

Ein fyritøka er ikki ein fysiskur persónur, og tí kann ein fyritøka hvørki lurta ella hyggja eftir KVF. Tey einastu, sum kunnu hoyra KVF í eini fyritøku, eru tey sum arbeiða har og viðskiftafólkini. Hesi rinda øll kringvarpsgjald frammanundan og tí er slíkt gjald á fyritøkurnar eitt dupult gjald, sum als ikki eigur at vera.

Lógin sigur, at gjøldini eru ymisk í mun til støddina á fyritøkuni. Hugsa vit minni fyritøkur, sum t.d. handlar, hárfríðkanarstovur, handverkarafyritøkur o.s.fr., so hava flestu av hesum lønargjaldingar millum 1 og 3 mió. kr. Tað merkir, at tær skulu rinda 7.000 kr. um árið í kringvarpsgjaldi.

Nógvar fyritøkur hava skipað sítt virksemi í ymiskum partafeløgum. Fyri tær er kringvarpsgjaldið fleirfalt.

Vit eiga at geva vinnuni so góðar karmar sum møguligt. Vøkstur í samfelagnum sprettur úr vinnuni og tí eiga vit at gera sum grannalondini, nevniliga at avtaka og minka gjøld. Hetta uppskot er eitt í røðini at avtaka og minka gjøld á vinnuna.

Vinnufeløg eiga ikki at rinda kringvarpsgjald.

Fíggjarligu avleiðingarnar verða, at vinnan sleppur undan einum tyngjandi gjaldi og at KVF missir nakrar inntøkur. Inntøkurnar hjá KVF vóru í 2015 íalt 60,7 mió. kr.  og væntast í 2018 at verða 71,4 mió. kr. Slíkan lutfalsligan vøkstur hevur eingin annar almennur stovnur fingið, sjálvt ikki sjúkrahúsini. Út frá hesum kann ikki verða nakar trupulleiki hjá KVF at klára seg við minni inntøkum enn 71,4 mió. Kr.

**Serligar viðmerkingar:**

**Til § 1**
Við hesi lógarbroyting verða feløg, ið eru umfatað av § 5 (vinnufeløg) í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg, (partafelagalógin) undantikin at rinda kringvarpsgjald**.**

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi, 19. september 2018**

Jørgen Niclasen